# Fáar umsóknir til leiðandi størv á Landssjúkrahúsinum

*Seks umsóknir til fimm størv. Hetta varð tað soltna úrslitið, nú freistin at søkja leiðarastørvini í sambandi við nýggja bygnaðin, er úti*

ÁKI BERTHOLDSEN



*Viðurskiftini á Landssjúkrahúsinum hava verið ógvuliga´ogreið. Tað kann vera ein orsøk til, at so fá vilja søkja tey leiðandi størvini á okkara høvuðssjúkrahúsi, heldur Marin Vang, sjúkrarøktarstjóri. Men so mikið størri týdning hevur tað, at vit fáa væl skikkað fólk í leiðarastørvini, heldur hon*

Tað kann ikki sigast at vera stórur áhugi hjá læknum og sjúkrasystrum at átaka sær leiðandi størv á Landssjúkrahúsinum.

Í sambandi við nýggja leiðslubygnaðin skuldu átta nýggj leiðarastørv setast á Landssjúkrahúsinum.

Talan er um starvið sum læknastjóri, starvið sum sjúkrarøktarstjóri, umframt størvini sum leiðandi yvirlækni og yvirsjúkrasystir á psykiatriskudeild, medisinskudeild og skurdeildini.

Níggjunda starvið í nýggju leiðsluni á Landssjúkrahúsinum er starvið sum sjúkrahússtjóri, og tað er eisini lýst leyst nú.

Men higartil er tað bara eydnast á seta tvey størv, nevniliga starvið sum sjúkrarøktarstjóri, sum Marin Wang er sett í og starvið sum leiðandi yvirlækni á skurðdeildini, sum Jóan Petur Davidsen er settur í.

Størvini sum yvirsjúkrasystir á teimum trimum deildunum hava ikki verið lýst leys áður.

Hinvegin hava bæði starvið sum læknastjóri og størvini sum leiðandi yvirlækni á teimum trimum deildunum áður verið lýst leys innanhýsis á Landssjúkrahúsinum, men tað kom bara tann eina umsóknin og tað var áðurnevnda umsókn til starvið sum leiðandi yvirlækni á skurðdeildini.

Harumframt kom bara ein umsókn til starvið sum læknastjóri.

Úrslitið var, at starvið á skurðdeildini varð sett.

Samstundis varð Jón á Steig settur at røkja starvið sum læknastjóri fyribils.

Í sama viðfangi varð gjørt av at lýsa størvini sum leiðandi yvirlækni og starvið sum læknastjóri leyst av nýggjum.

### Fáar umsóknir

Fyri kortum vórðu so hesi trý størvini lýst leyst, sum tað ikki eydnaðist at seta fyrru ferð, saman við teimum trimum størvunum sum yvirsjúkrasystrar.

Umsóknarfreistin var úti hósdagin til øll størvini, uttan til starvið sum leiðandi yvirlækni á medisinsku deild.

Á Psykiatrisku deild varð søkt eftir einum leiðandi yvirlækna og eini yvirsjúkrasystir. Ongin søkti læknastarvið men ein umsókn kom til starvið sum yvirsjúkrasystir.

Harumframt varð søkt eftir einum yvirlækna, men heldur ikki til tað starvið kom nøkur umsókn.

Hetta starvið hevði tó onki vil leiðslubygnaðin at gera.

Á Skurðdeildini varð søkt eftir eini yvirsjúkrasystir og tað kom ein umsókn til ta starvið.

Og á medisinsku deild varð søkt eftir eini yvirsjúkrasystir, men heldur ikki til tað starvið kom nøkur umsókn.

Hinvegin gekst betur at søkja eftir læknastjóra hesuferð, tí ímeðan ein umsókn kom fyrru ferð, komu fýra umsóknir hesuferð. Ein umsókn kom afturat, men hon kom ov seint.

Talan er bæði um umsóknir frá føroyingum og frá útlendingum.

### Fleiri orsøkir

Marin Vang, sjúkrarøktarstjóri sigur, at tað kunnu vera ymsar orsøkir til, at tað er so lítil áhugi fyri størvunum.

Men hon heldur, at ein orsøk til at fólk aftra seg við at søkja, kann verða, at tað hevur elvt til ótryggleika, at leiðslubygnaðurin hevur verið so ógreiður.

Ein orsøk kann eisini vera, at tær ymsu deildirnar deild hevur følt seg setta til síðis og hevur fingið ov lítið av peningi at arbeiða við.

Men hon heldur eisini, at ein trupulleiki kann vera, at tað eru og fáir skikkaðir umsøkjarir „á marknaðinum" til summi av størvunum, eitt nú til læknastørvini á psykiatrisku deild, og av tí sama blíva tað eisini ov fáir umsøkjarar til størvini.

– Men so mikið størri týdning hevur tað, at vit fáa væl skikkað fólk at átaka sær størvini fyri at lyfta deildina upp aftur.

– Og í øllum førum er tað positivt, at vit hava fingið umsøkjara til yvirsjúkrasystrastarvið á psykiatrisku, so at hon kann vera við í hesum arbeiðnum.

Marin Vang sigur, at nú fara tey at royna at eggja onkrum til at átaka sær yvirlæknastarvið á psykiatrisku deild fyribils, til ein endalig loysn kann fáast.

Hon leggur afturat, at enn er støða ikki tikin til, antin tey størvini verða sett, sum bara ein umsøkjari varð til.

Hinvegin er onki tað væntandi, at at starvið sum læknastjóri verður sett ímillum tær fýra umsóknirnar, sum komu inn.

Tey størvini, sum ongar umsóknir vóru til, verða lýst leys av nýggjum sum skjótast.

## Norsk Hydro svarar atfinningum

Hesa seinastu tíðina hevur verið nógv skriving í norskum bløðum og nakað hevur eisini verið frammi í føroysku fjølmiðlunum um málið viðvíkjandi teimum trimum fyrrverandi Sagafólkunum, sum herfyri fingu fútaforboð at virka sum ráðgevar hjá Føroya Kolvetni í 1. føroysku útbjóðingini.

Ein norskur stórtingslimur hevur sett vinnumálaráðharranum spurning í málinum, har hann m.a. spyr, um ikki Norsk Hydro í hesum máli er við at seta kílar í viðurskiftini millum Føroyar og Noreg.

Norska blaðið Dagbladet hevur eisini gjørt nógv burtur úr. Eitt nú hevur næstformaðurin í SV, Øystein Djupedal úttalað seg til blaðið um, at „saken stinker fra start til mål. Norsk Hydro tramper rundt og prøver å presse sig til en plads i Færoyenes første konsesjonsrunde".

Ein undirrættur í Olso gav Norsk Hydro viðhald, tá tað bað rættin seta fútaforboð móti trimum ráðgevum hjá Føroya Kolvetni, sum fyrr hava arbeitt hjá Saga, sum Norsk Hydro hevur keypt. Norsk Hydro metti, at hesir høvdu ikki loyvi at lata einum kappingarneyta handilsligar loynidómar, sum teir høvdu fingið gjøgnum sítt arbeiði í Saga. Síðani er tað hent, at teir tríggir ráðgevararnir hava kært dómin inn fyri landsrættin. Hann fer at taka málið upp í summar.

Nú hevur so Norsk Hydro, sum vanliga ikki plagar at fara út í miðlarnar við aftursvari til tað, sum stendur í pressuni, latið gera eitt tíðindaskriv, sum vit prenta. Skrivið er soljóðandi:

**Oslo, 14 juni 2000:**

Enkelte oppslag i pressen den senere tid har viderebrakt feilaktige påstander om Hydros forhold til første konsesjonsrunde for leting etter olje og gass på Færøyene. Oppslagene er av en slik karakter at Hydro på denne måte ser seg nødt til å kommentere de påstander som fremkommer. Hydro vil normalt ikke delta i en åpen debatt om forhold som verserer for rettsapparatet, men i lys av oppslagenes karakter finner Hydro det påkrevet i dette tilfellet.

Saken dreier seg om at Norsk Hydro Produksjon AS og dets heleide datterselskap Saga Petroleum AS 19. april 2000 begjærte midlertidig forføyning overfor tre tidligere ansatte i Saga Petroleum AS og det aksjeselskapet som disse tre har stiftet (Sagex Petroleum AS). Det nystiftede selskapet er norsk. Begjæringen gikk blant annet ut på at Sagex Petroleum AS og dets ansatte måtte forbys å utarbeide - eller å delta ved utarbeidelse av - konsesjonssøknader om leting etter eller produksjon av olje eller gass på færøysk sokkel og på tilstøtende britisk territorium, avgrenset til det såkalte Atlantic Margin Area (Atlanterhavsmarginen). I tid var begjæringen begrenset til å gjelde for den første konsesjonsrunde for olje og gass på Færøyene, samt den nittende konsesjonsrunde på britisk sokkel.

De tre tidligere Saga-ansatte som ble saksøkt, er alle tidligere sentrale medarbeidere i Sagas Færøyeneprosjekt. Alle hadde i flere år arbeidet i Sagas tjeneste med utforskning av havområdene rundt Færøyene for å kartlegge mulighetene for å gjøre drivverdige olje- og/eller gassfunn. Etter Hydros oppfatning har de tre tidligere ansatte etter sin fratreden på rettsstridig vis utnyttet forretningshemmeligheter som de har tilegnet seg hos sin tidligere arbeidsgiver, først og fremst ved å bistå det færøyske selskapet Føroya Kolvetni med forberedelse og utarbeidelse av søknad om konsesjon til leting etter og produksjon av olje og gass i de aktuelle områdene. Den rettsstridige utnyttelsen har etter Hydros oppfatning skjedd i strid med den taushetsplikt de tre fortsatt er bundet av overfor Saga Petroleum AS, i strid med lojalitetsplikten i ansettelsesforhold såvel som i strid med markedsføringslovens bestemmelser.

Hydro fikk medhold på alle punkter i Oslo namsretts kjennelse av 12. mai 2000. Begjæringen er påkjært av de tapende parter.

Hydro ser positivt på at norsk kompetanse kommer til anvendelse også utenfor norsk sokkel, dog med den begrensing som er satt i namsrettens kjennelse. Det har ikke på noe tidspunkt vært Hydros intensjon å utøve yrkesforbud overfor de tidligere Saga-ansatte eller deres selskap. Tvert imot, ga Hydro i forbindelse med Saga-integrasjonen økonomisk kompensasjon til ansatte som sluttet. De tre tidligere Saga-ansatte som denne saken gjelder, valgte alle å slutte frivilling i selskapet og mottok i den forbindelse også særskilt økonomisk støtte for å utvikle virksomhet utenfor Hydro.

Hydro vil ta avstand fra påstander om at selskapet Føroya Kolvetni nektes å konkurrere om konsesjoner på færøysk sokkel. Hydro presiserer derfor at begjæringen om midlertidig forføyning ikke var rettet direkte mot det færøyske selskapet Føroya Kolvetni, og at den avsagte kjennelsen dermed heller ikke er det. Begjæringen rettet seg mot tidligere ansatte i Saga Petroleum AS, og var basert på en oppfatning om at disse har brutt sin taushetsplikt og har handlet illojalt overfor sin tidligere arbeidsgiver. Det har ikke på noe tidspunkt vært Hydros hensikt å hindre den frie konkurransen om tildeling av konsesjoner på færøysk sokkel. Hensikten er ene og alene å forhindre rettsstridig bruk av forretningshemmeligheter.

Tíðindaskrivið er undirskrivað av Tor Steinum og Kristin Brobakke.



# Málfrøðingar meta um føroyskt

*Farnu dagarnar hava níggju viðurkendir útlendskir málfrøðingar verið fyrilestrahaldarar á eini ráðstevnu um føroyska málið, ið Føroyamálsdeildin á Fróðskaparsetrinum skipar fyri.*



*Føroyskir og útlendskir málfrøðingar eru í hesum døgum á ráðstevnu á Føroya Lærarskúla*

*Mynd: Jens K. Vang*

RÚNAR REISTRUP

„Symposium om lingvistiske teorier og færøsk".

Heitið á málvísindaráðstevnuni, sum í hesum døgum verður hildin á Føroya Læraraskúla, ljóðar í sær sjálvum vísindaligt og talan er eisini um eina røð av fyrilestrum, ið krevja eina ávísa vitan um mál, skalt tú gera tær vón um at fáa nakað burturúr.

Áhoyraraskarin er settur saman av núverandi og fyrrverandi næmingum á Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetrinum, teirra undirvísarum, føroyskum málgranskarum, nøkrum einstøkum lærarum og ikki so fáum útlendskum málgranskarum, ið eru komnir hendavegin at fáa íblástur til arbeiði sítt.

- Tað kom heldur óvart á okkum, at áhugin fyri ráðstevnuni var so stórur millum útlendskar granskarar. Stutt eftir, at vit høvdu sent innbjóðingarnar, komu fleiri aftursvar frá fólki, ið ætlaðu sær at koma til Føroya í sambandi við ráðstevnuna, sigur ein av høvuðsfyrireikarunum, Jógvan í Lon Jacobsen av Føroyamálsdeildini.

Tey sum skipa fyri ráðstevnuni eru Málráð Norðurlanda, Føroya Lærraraskúli, Føroyamálsdeildin á Fróðskaparsetrinum og Kurt Braunmüller.

### Útlendingarnir kennast við føroyskt

Tað kann kanska ljóða eitt sindur margháttligt, at allir fyrilestrarhaldararnir á einari málvísindaráðstevnu um føroyskt, eru útlendingar.

Men sambært Jógvani í Lon Jacobsen, duga fleiri av útlendsku málfrøðingunum at tosa føroyskt, og allir hava teir sett seg inn í føroyskt mál eftir júst teirri grein av málfrøðini, ið teir fáast við.

Sum dømi um kunnleikan hjá hesum málfrøðingum nevnir hann, at fyrsti fyrilestrarhaldarin á ráðstevnuni, fráfarni professarin á universitetinum í Keypmannahavn, Jørgen Rischel, hevur skrivað inngangin í Føroysku-donsku orðabókini eftir Chr. Matras og M. A. Jacobsen.

### Fara vísindaliga til verka

Annars er tað ikki so umráðandi, um útlendsku málfrøðingarnir duga at tosa føroyskt flótandi ella ikki, tí á ráðstevnuni verður farið vísindaliga til verka.

Teir níggju fyrilestrahaldararnir eru allir serkønir innan hvør sína grein av málfrøðini, tað veri seg ljóðfrøði, málsøgu, setningsbygnað, sosiolingvistik og so framvegis. Teir hava stóran kunnleika til ástøði, og arbeiða eftir hesum, líkamikið hvat mál, ið verður viðgjørt.

Á ráðstevnuni her byrja teir allir við at bera fram ástøðiliga grundalagið undir teirri grein av málfrøði, sum teir vanliga fáast við. Síðan verður hugt eftir, hvussu hesar passa til føroyskt - og hvat tær kunnu siga um føroyska málið.

Við at hyggja at føroyska málinum frá einum ástøðiligum sjónarhorni, gerst tað møguligt at seta føroyskt mál í størri høpi.

### Íblástur til føroysku granskararnar

At fara ástøðiliga til verka og seta føroyskt inn í størri høpi er ikki júst fremmant fyri granskarar og lesandi á Føroyamálsdeildini.

Men Jógvan í Lon Jacobsen væntar sær og hinum føroysku málfrøðingunum nógvan íblástur av ráðstevnuni.

- Hendan ráðstevnan skal eggja okkum, sum dagliga sita og arbeiða við føroyska málinum, til at halda fram og kanska til at lata eyguni upp fyri nýggjum sjónarvinklum. Vit skulu síggja nýggjar vegir at fara eftir í granskingini av móðurmálinum, greiðir hann frá.

Ráðstevnan varð sett tíðliga hósmorgunin, og heldur fram til út ímóti kvøldi í dag. Ráðstevnan er skipað soleiðis, at fyrrapartar hava tríggir fyrilestrar verið hildnir. Seinnaparturin er farin við, at fólk hava sett seg í arbeiðsbólkar, ið hava viðgjørt føroyska málið eftir tí, sum fyrilestrarhaldararnir hava lagt fram fyrr á degnum. Um kvøldið hava luttakararnir havt høvi til at sæð Tinganes, Listaskálan og Fornminnissavnið.

Flestu fyrilestrarnir hava verið hildnir á norðurlendskum máli, men onkur einstakur hevur verið á enskum.



*Hjalmar Petersen lurtar*
*Mynd: Jens K. Vang*

hallo.fo

Tórshavn - Tlf. 218500 - hallo@hallo.fo

ERICSSON NOKIA SIEMENS MOTOROLA

**Frá í dag, 01. juli 2000 kemur sambært løgtingslóg um ferðslu m.a. hetta í gildi :**
**"§ 16b. Førari av akfari má ikki, meðan hann koyrir, brúka handhildna fartelefon."**

**Nýggi nethandilin á www.hallo.fo hevur hondfría útgerð til flest allar GSM fartelefonir, umframt eitt gott úrval av GSM fartelefonum, tráðleysum telefonum og tilhoyri til sera rímiligar prísir.**

**TILBOÐ**



**Minsta fartelefonin frá Ericsson**
**Ericsson T28s við hondfríari útgerð, t.e. oyrasniðil + mikrofon við svarknøtti fyri einans**

**kr. 3495,-**

**(Tilboðið er bert galdandi til 31.07.2000)**

**w w w . h a l l o . f o**

Sosialurin - 311820